# Gott hugskot

Hetta er eitt gott hugskot, søgdu tey bæði Petur Juul Jacobsen og Armgarð Klein í Havn, sum vóru við á túrinum í Edinburgh seinasta leygardag.

Túrurin var væl fyriskipaður við staðkendum ferðaleiðara, sum vísti okkum søgulig støð í Edinburgh, sum er ein gamal og áhugaverdur býur.

Harumframt bar væl til at uppliva nakað sjálvur eins og at vitja handilsgøturnar í býnum.

Vit halda, at hetta er eitt gott hugskot og ein góður møguleiki hjá føroyingum at fáa ein annarleiðis upplivning ein leygardag. Eisini er tað ein fyrimunur at kunna fara og koma heim aftur sama dag.




*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# - Alt ov stuttur túrur

**Tvær dámur úr Klaksvík fingu høvið at síggja býin og vitja handlarnar í Edinburgh.**

ÚTFERÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík-Edinburgh:** - Hetta hevur verið ein sera góður túrur. Men hann var bara alt ov stuttur.

Millum luttakararnar á serstaka túrinum til Edinburgh vóru tvær dámur úr Klaksvík – Sigrid Hansen og Maria Bjartalíð.

Tá tær, og hini í ferðalagnum, komu á flogvøllin í Edinburgh stóð bussur fyri teimum og koyrdi tey runt til ymisk kend støð í høvuðsstaði Skotlands.

- Hetta var alt sera áhugavert, men tað tók nakað nógv av tíðini í stutta steðginum í býnum, siga tær báðar.

## Heldur bíligari

Tær fingu kortini tíð til at vitja nakrar av mongu handlunum í miðbýnum.

- Men tað var heldur lítið av tíð til at keypa nakað, siga tær.

Meðan tær soleiðis vitjaðu handlarnar í býnum kundu tær gera sínar metingar og sínar samanberingar av prísi og úrvali har, og móti tí, sum tær kenna til í handlunum í Klaksvík og aðrastaðni í landinum.

- Tað var heldur bíligari her, siga tær báðar. Men so leggja tær eisini aftrat:

- Ein skal so ikki fara til Edinburgh, um ein skal leita sær eftir mótaklæðum! Tær funnu tó fleiri handlar við barnaklæðum, eisini fittum barnaklæðum.

- Hesi vóru ikki so dýr at keypa.



*- Ein skal ikki fara til Edinburgh at leita eftir mótaklæðum, siga tvær klaksvíksdámur – Sigrid Hansen (vm.) og Maria Bjartalíð*

*Mynd: Maggi Gunnarson*